## DAGSINS MEINING

# Indiaferð og hvat so!

Herfyri var stór føroysk sendinevnd í India. Við í ferðalagnum vóru umleið 25 umboð fyri føroyskt vinnulív og síðani nøkur umboð fyri løgmansdeildina í Tinganesi við sjálvum løgmanni á odda.

Undan fráferðini greiddi løgmaður frá, hví tey høvdu tikið hetta stigið og hví man hevði valt júst India. Og hetta endurtók hann eisini eftir heimkomuna. Niðurstøðan var tann, at Føroyar hava brúk fyri at vera við í altjóðagerðini og at síggja, hvussu henda verður framd í verki. Mett var at India er eitt av teimum londum, sum fyritøkur í Føroyum kunnu samstarva við og eisini fáa íblástur frá til at vera meira virknar í sjálvari altjóðagerðini.

Sum ítøkiligt dømi um slíkt samstarv varð nevnt sáttmálin, ið virkið Vónin fekk at gera út fiskisskip við stórum troli til pelagiskan fiskiskap. Í tí sambandinum fekk Vónin eitt virki í India at gera ein part av trolinum, soleiðis at virkið harvið varð kappingarført í royndini at fáa sáttmálan. Áhugavert var at merkja sær, at føroyska sendinevndin eisini hevði høvi til at vitja júst hetta virkið á ferðini.

Heimafturkomin hava vinnulívsumboðini og løgmaður sjálvur greitt fjølmiðlum frá, at ferðin var sera væleydnað. Tey mongu umboðini fyri vinnulívið eru samd um, at hetta var ein gevandi og lærurík ferð, og har tíðin fer at vísa, hvat ítøkiliga kemur burtur úr. Men sum skilst hevur bara ferðin í sær sjálvum verið til stóran íblástur fyri føroysku umboðini, sum hvør í sínum lag siga gott fyri hesi vitjan, og at tey ikki vildu verið hana fyriuttan. Eitt nú verður stórur dentur lagdur á júst hetta at hava løgmann við sum durðaopnara. Løgmaður sjálvur hevur so eisini gjørt greitt, at hetta verður neyvan seinasta ferðin hann ger av slíkum slag. Hann tekur fegin orðini hjá eitt nú stjóranum í Vinnuhúsinum til eftirtektar um, at løgmaður eigur at standa á odda fyri slíkum kunningar- marknaðarføringsferðum í framtíðini og at hetta eigur at vera ein nýggjur og náttúrligur partur av virkisøkis løgmans.

Tað hevur eisini verið funnist at ferðini og hava røddir verið frammi um, at India varð ikki rætta staðið at fara til, og at ferðin varð ikki nóg væl fyrireikað osfr. Tað kundi verið áhugavert við eini almennari evaluering av slíkari ferð, har umboð fyri vinnulívið greiddu frá ferðini og úrslitunum og har høvi eisini varð til at seta spurningar. Sum skilst er ætlanin hjá bæði Vinnuhúsi og Menningarstovu saman við løgmandeild at taka okkurt slíkt stig og eigur tað at vera kærkomið.

Tað er bæði gott og rætt at evaluera slíkar ferðir, soleiðis at úrslit og royndir verða løgd fram og har møguleiki eisini er at seta spurningar og harvið fáa eitt gevandi orðaskifti. Var hetta rætti mátin, var India rætta valið, varð samansetingin av ferðalagnum tann rætta, hvat kom burtur úr ítøkiliga og í aðrar mátar og hvussu kunnu vit læra av slíkari ferð, tá vit í framtíðini skulu gerast enn virknari partur í altjóðagerðini? Heldur enn at kasta eftir hvørjum øðrum í hvør sínum horni og hvør sínum lagi eiga vit at leggja øll kort á borðið. Vit eru alt ov fá í hesum landi og tíðin og orkan alt ov kostnaðarmikil til bara at taka fram og dyrka tað negativa, hóast skilagóðir spurningar eiga at verða settir til eina og hvørja tíð og krittisk evaluering eisini eigur at vera partur av eini og hvørjari søk. Latið okkum fáa ein positivan dialog, har øll sjónarmið sleppa framat. Og latið okkum hoyra, hvat kom burtur úr hesi spennandi ferð. Tí er sera skilagott við einum uppfylgjandi tiltaki, har tað ber til líta bæði aftur eftir og ikki minst frameftir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bræv til Fólkaflokkin

**JÓGVAN VIÐ KELDU**
Løgtingsmaður



**HEÐIN ZACHARIASEN**
Løgtingsmaður



**POUL MICHELSEN**
Løgtingsmaður



**Viðvíkjandi fyrispurningi frá Jørgen Niclasen til Bárð Nielsen seinasta mikudagin 8. mars um uppbýti av lands- og kommunuskatti.**

Í samband við omanfyrinevnda fyrispurning, fara vit at vísa til ávíkavist samrøðu og grein okkara í Sosialinum 10. og 13. mars og tað, sum sagt varð í løgtinginum, har vit mótmæltu floksins støðu hjá bæði fyrrverandi og núverandi formanni í tingbólki Fólkafloksins.

Vit eru, sum eisini víst er til í Sosialinum, samdir um, at sjálvur fyrispurningurin frá Jørgen Niclasen til Bárð Nielsen er í fínasta lagi og viðkomandi, men átala tað, sum síðani kom fram undir sjálvari umrøðuni.

Tað sum bæði Óli Breckmann og Jørgen Niclasen søgdu undir viðgerini og tann misteinkiligerðing av kommununnar brúki av pengi, er uttanfyri alt mark og uttan grundarlag.

Kommunrnar komu ótrúliga væl undan kreppuni, uttan at fáa nakra sanering, (tó varð javnað frá betri til verri stillaðar kommunur), meðan tað ikki kann sigast um hinar partarnar í samfelagnum.

Fólkaflokkurin gongur – og vil framvegis ganga – á odda fyri at fáa savna kommunnar í størri eindir, so hesar kunnu fáa fleiri mál løgd út til umsitingar.

Hetta er neyðugt fyri bæði borgaran og nærleikan, samstundis fer hetta í longdini at gerast bíligari, tí vit vita, at kommunurnar hava ikki minni ábyrgdarkenslu enn landsmyndugleikarnir, og eru avgjørt minst líka væl fyri at umsita mál, sum landsmyndugleikin er. Hetta hevur týðiliga verið prógvað. – Vit vita eisini at hetta er eitt vinnaramál í longdini.

At Javnaðarflokkurin var enntá harðligari í viðmerkingunum um kommunurnar, sum vísir teirra politikk, so er eingin verja í tí.

Undirritaðu gera vart við, at Fólkafloksins politikkur hevur sum mál, at hava greiðan skilna á uppgávum millum land og kommunur og vilja leggja mundandi meira út til kommunur við teirri sanføring, at hesar røkja tænasturnar betri og við dyggum fíggjarligum atliti.

Samstundis vóna vit, at kommunur halda fram at átaka sær umsitingarligar uppgávur í sama treysti sum higartil.

Við hesum vísa vit enn einaferð til ávíkavist grein og viðtalu okkara í Sosialinum 10. og 13. mars, og tað sum sagt varð í tinginum undir viðgerðini, og mótmæla soleiðis at Fólkaflokurin kemur at standa fyri tílíkari atferð mótvegis kommununum.

# SUM TÍTT SVØRÐ ER HVAST

Sum títt svørð er hvast,
sum tín hond er hørð;
sum tú tekur fast
um tey broysknu kør.

Myrk er mín rødd
og mín hond er køld;
brotnar harða stál
hokna hægstu vøld.

Er einki ið blíðkar
títt grima brá;
er eingin linni
eru eingi ráð?

Er myrk mín ásjón
er hart mítt mál,
hygg fast í mítt eyga
hygg beint í mítt stál.

Veri sál tín trygg
veri lund tín kvirr;
kom við mær og grynn
har tú ei grynti fyrr.

Faftra ei, fylg mær
á sorgar botn;
nert við mítt gler
og mítt harða horn.

Nert við mítt stál
og mín kalda serk;
far so um tú orkar
til dagsins verk.

Set so um tú orkar
nýggj fræ í mold;
kanska hoyrist ein sangur
kanska grønkar ein fold.

Kanska leikar har spølið
hitt eyma kind;
kanska stinnari bak
ber mín harða vind.

Sum títt svørð er hvast,
sum tín hond er hørð;
sum tú tekur fast
um tey broysknu kør.

Myrkt er mítt mál
og mín hond er køld;
brotnar harða stál
hokna hægstu vøld.

**Hanus Kamban**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.